# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



*3. oktobur fingu Fríða, Árni og Inga eina lítlasystur. Hon vigaði 3200 gram og var 52 cm long. Mamman og pápin eita Mai og Marni*

23. septembur fingu Hjørdis Müller og Olvheðin Thomsen, Hvalba, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3370 gr.

25. septembur fingu Kristianna Poulsen og Niels Arge Galán, Hoyvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3800 gr.

3. oktobur fingu Birita Fritleifsdóttir Kjærbæk og Dagbjart Meierberg, Tórshavn ein son á Glostrup Sjúkrahúsi. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4350 gr.

10. oktobur fingu Rannvá Lind og Borgar Hansen, Toftir, ein son. hann var 54 cm. langur og vigaði 3420 gr.

10. oktobur fingu Eileen og Kári Olsen, Rituvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4000 gr.

11. oktobur fingu Oddvør Poulsen og Mayfinn Norðoy, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3800 gr.

12. oktobur fingu Annika og Poul-Kjartan Poulsen, Sandvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 2900 gr.

14. oktobur fingu Anna Jórun Heinadóttir og Finn Wenning-sted Larsen, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3850 gr.

14. oktobur fingu Elinborg og Kári Reynheim, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4295 gr.

15. oktobur fingu Karina Jensen og Henrik Lognberg Danielsen, Skopun, ein son. Hann var 49 cm. langur og vigaði 2900 gr.

16. oktobur fingu Maria og Allan Joensen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4350 gr.

16. oktobur fingu Eyð Berg og Arnhold Olavsson, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3850 gr.

16. oktobur fingu Siri V. Rasmusson og Regin Eyðfinsson, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3300 gr.

19. oktobur fingu Rannvá Jacobsen og James við Brúgv, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3850 gr.

# Wensil Hansen á Toftum til minnis



Mánadagin fingu vit tungu og óvæntaðu boðini um, at Wensil var deyður. Man steðgar á eina løtu og fær seg ikki at trúgva tí.

Við sínum lætta sinni, og sínum positiva verumáta, lýsti Wensil upp har sum hann kom. Heilt frá smádreingi var hann raskur og góður egnari, og seinni, tá íð hann hevði fingið annað arbeiði, dámdi honum væl at taka ein stamp av og á.

Í unglingaárunum var Wensil við á liðunum hjá B68, har hann var millum teir allar skjótastu. Seinni fór hann til skips og sigldi millum annað við Morgunstjørnini. Fleiri ár var hann við Volunteer, har hann var kokkur eitt tíðarskeið. Eisini hevur hann róð út við bátum av Toftum.

Hesi seinastu árini hevur Wensil arbeitt hjá Fiskavirking á Toftum. Har hevur hann verið nógv avhildin, og hansara evnir og áhugi at kokkast komu væl við hjá arbeiðsfólkunum, har hann eisini gjørdi døgurða til teirra á virkinum, og vóru tey sera glað um tað.

Eisini í B68-húsinum var Wensil altíð skjótur at taka eina hond í og val lá fyri, altíð val tilpassar, við einum smíli. Hann varð ein íðin B68 viðhaldsmaður, og var altíð sera spentur, tá dystur var á skránni.

Wensil er uppvaksin í einum góðum og tryggum heimi, har foreldrini Emma og Harry hava lagt alt tað góða niður í børnini. Teir vóru tryggir brøður, og ein systur, sum tey mistu tá hon bara varð 1/2 ára gomul. Tað var eisini ein sera torfør tíð fyri familjuna. Men Gudstrúgvin bar tykkum ígjøgnum stóru sorgina.

Vit fara øll at sakna Wensil, og tann partin av myndini her á staðnum, sum hann var. Størstur verður saknurin hjá tykkum foreldrum og syskjum, og tykkum sum stóðu honum so nær. Eisini hesaferð fara lyftini hjá Harranum um hjálp og styrki í torføru tíðini við tungu sorgini at vísa seg at vera sonn, og at hjálpa tykkum at koma ígjørnum sorgina.

Við hesum fáu orðum vil eg lýsa frið yvir minnið um Wensil Hansen

**Vinur**

# Torgerð Suðuroy 60 ár



20. oktober fyllir Torgerð Suðuroy í Vági 60 ár.

Hjá foreldrunum Esther og Einari vaks hon upp á Kikslið í Vági. Hon royndi seg innan ymsar vinnuvegir í ungdómsárunum, arbeiddi fisk og var í húsplássi.

Niðri í Danmark royndi hon eisini sínar veingir. Í 1966 fór hon sjálv onnur í Kibutz í Ísrael. Hetta var ikki so vanligt tá og harafturat vóru hetta jú ófriðaligar tíðir har á leiðini.

Torgerð hevur alla sína tíð verið sera virkin, har hon hevur verið, og í Vági hevur hon tikið mong tøk og verið við til at sett ferð á so mangt.

Hon hevði grill-bar í Vági og kiosk. Handlar hevði hon í mong ár, ikki bert í Vági, men kring landið, í Havn og í Runavík.

Kreativ er hon og í áttatiárunum fór hon undir gull og silvurverksmiðju. Hon gjørdi bart; Setti ein svein í starv og fór so í læru á egnum verkstað. Og innan hetta yrki er hon í dag kend og vird.

Tær nevndir og tey feløg, ið hava notið gott av stóru arbeiðsorku hennara, eru ikki so fá. Hon var í fremstu rød, tá sjónvarpsfelag varð sett á stovn í Vági og stóð , saman við øðrum, fyri at leggja skrá og senda. Hon var í fremstu røð í Kvøldhugna, har so mong hugnakvøld gjørdust ógloymandi. Hon hevur verið, og er, oddafiskur í sjónleikarafelagnum í Vági og mangur leikur hevur millum ár og dag verið settur upp. Og felagið hevur verið manga ferð við leikum kring Suðuroynna og eisini norðanfjørðs.

Torgerð er nevndarlimur í Vágs Matmøðrafelag, ið hevur verið sera virkið. Felagið keypti hús miðskeiðis í áttatiárunum og nakað seinni fór felagið undir at reka Suðuroyar Heimavirkið, ið er fjølbroyttur handil, sum í dag heldur til í nýggjum, stásiligum húsum. Vágs matmøðrafelag átti eisini sín lut, tá eldrasambýli varð bygt í Vági og Torgerð er limur i nevndini fyri býlið, umboðandi Matmøðrafelagið.

Torgerð hevur í mong ár verið virkin, tá pensjónistarnir hava hugnaløtur og hevur hon fyrireikað og undirhildið fyri teimum. Og júst sum undirhaldari hevur hon í mong ár staðið á palli og hevur gjørt manga løtu skemtiliga.

Nóg mikið kundi verið at trivið í um tey farnu ár, tí lívsvirkið hevur verið fjøllbroytt. Hon hevur roynt seg á so mongum økjum og hevur ikki verið, og er ikki, bangin fyri at taka við nýggjum avbjóðingum.

Torgerð og Harry eiga 3 børn; Djonu, Esther og Aslaug. Og ommu og abbabørnini eru eisini 3; Brandur, Harry og Torgerð.

Dagurin verður hildin í VB-húsinum.

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin